

*Nakrir av føroyingunum, sum sigla við Nataarnaq, avmyndaðir á brúnni á túrinum á Sandoyarbankanum mánadagin 11. juli: Frá vinstru: Sjúrður Jacobsen, Andrias Lava Olsen, Eyðfinn Johannesen, Martin Jacobsen, Kristian Christiansen, Óla Jákup Jacobsen, Tummas Lervig, Jóhann Samuelsen, Dávur Dímun Mohr og Oyvinn Joensen*

# Teir eru burturi aðru hvørja Ólavsøku

**Á Sandoyarbankanum við føroyskum yvirmonnum umborð á grønlendskum trolara, sum á veg til fiskiskap legði at í Føroyum, tí reiðsskapurin var bíligari at keypa her enn aðra staðni**

HUGLEIÐINGAR Á SANDOYARBANKANUM

*Orð: Jóannes Hansen*
*Myndir: Heri Lava Olsen*

Tað er í sambandi við høgtíðirnar, at almenningurin mest verður mintur á, at nógvir føroyingar støðugt eru á høvunum kring allan heimin. Tað kennist hvørja ferð sum hábærslig staðfesting av, at føroyska fólkið framvegis er eitt siglandi fólk í nógv størri mun, enn landkrabbarnir í gerandisdegnum geva sær far um. Gleðilig jól ynskja vit øllum okkara kæru og reiðarí. Rokna við at halda jól í Indiska havinum. Heilsan føroyingarnir við hesum ella hinum skipinum.

Soleiðis ljóðar í útvarpinum, og tað fer sum ein ylur ígjøgnum kroppin. Hesir eru kanska aðru hvørja ferð burturstaddir, tá ið talan er um høgtíðirnar, sum serliga eru ætlaðar til hugna og fráspenning í familjuhøpi.

Kenslan gerst serliga viðkomandi upp undir stóru kristnu høgtíðirnar - jól, páskir og hvítusunnu. Hesa ársins tíðina eru tær farnar aftur við borðinum fyri hesa ferð. Tað verður ikki fyrrenn um fimm mánaðir, at hetta aftur verður aktuelt.

Men í dag og í morgin er føroyska tjóðarhøgtíðin. Tað plaga ikki at vera heilsanir í útvarpinum frá føroyingum, sum eru burturstaddir og sigla kring knøttin við ynskjum um góða Ólavsøku. Men einki er at ivast í, at hugur teirra í hesum døgum leitar til føðilandið og teirra kæru. Undir øllum umstøðum, so bar tað soleiðis á næstsíðsta mánadag, at tað kendist nærliggjandi at leggja fyri við hesum.

Henda mánadagin lá grønlendski rækjutrolarin, Nataarnaq, á nýggju kei, sum tey plagdu at siga í Havnini, ella vestanfyri, sum tað nú verður sagt. Trolarin er ein av teimum umleið tíggju stóru rækjutrolarunum í Grønlandi. Hann varð bygdur í Spania fyri fýra árum síðani. Nú hevði hann fyrstu ferð verið í Fredericia til eftirlit, og teir høvdu givið honum eina orduliga yvirháling. 6600 hesta stóri motorurin hevur verið í botni, og teir hava havt aksultrekk. Tað sigur Jóhann Samuelsen, maskinstjóri. Hann kennir maskinrúmið og skipið ógvuliga væl. Tá ið skipið varð bygt í Spania í 2000 og 2001 vóru eitt nú hann og annar av skiparunum, Martin Jacobsen, har niðri tað nógva av tíðini.

Hin meistarin, Tummas Lervig, hevur siglt nógv í Grønlandi og í hesum reiðarínum. Men hann er spildurnýggjur her umborð, og hann dylir ikki, at hann kennir tað sum stóran forrætt, at honum hevur staðið hesin kjansurin í boði. Hann hevði annars umhugsað at leggja seg heima, men tá ið hesin kjansurin kom, so kundi hann ikki siga nei.

## Manningin

Á veg til Grønlands legði Nataarnaq, sum á grønlendskum merkir kalvi, at í Føroyum eftir útgerð. Teir høvdu biðið um tilboð frá fleiri, og Vónin átti bíligasta boðið. Talan var um ordra fyri umleið hálva aðru millión, og so dryppaði tað til aðrar veitarar. Eitt nú vitjaðu Kemilux og Poul Michelsen bilar á nýggju kei henda góðveðursdagin, og lemmarnir eru av Injector slagnum. Teir vóru upprunaliga konstrueraðir og framleiddir í Vági, og tað sigst, at tað aftur nú eru føroysk áhugamál uppi í framleiðsluni.

- Føroyingunum líkar sjálvandi væl, tá ið lagt verður at í Føroyum. So ber til at heilsa upp á familjuna. Høvuðsorsøkin hesa ferð var, at reiðaríið hevði tikið av tilboði frá Vónini, og tað hevur manningin avgjørt einki ímóti. Dygdin í arbeiðnum á trolvirkjum er góð alla staðni. Men millum føroyskar trolmenn verður mett, at dygdin í handverkinum hjá teimum á Vónini er uppaftur betri, enn hon er hjá øðrum.

Tað er Dávur Mohr í Havnini, sum greiðir okkum frá hesum, tá ið lagt verður frá landi. Túrurin er ikki so langur. Nataarnaq skal stima út á Sandoyarbankan at royna, um alt við reiðsskapinum er, sum tað eigur at vera. Loyvið frá Fiskimálaráðnum at útinna hesa uppgávuna 23 fjórð-




*Nataarnaq tekur føroyska útgerð umborð á nýggju kei í Havnini*